| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 18. oktober 2016 |
| Býráðsfundur nr. | 09/2016 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2016 tann 18. oktober kl. 17.00 varð eykabýráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 13. oktober 2016 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Sigga Óladóttir Joensen
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Petur Abrahamsen
Eyðun á Lakjuni
Árant Berjastein
Jann N. Toftegaard

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, kommunustjóri

**Mál nr. 67/2016.**

**Uppskot til nýggjan barnaskúla – meira enn ein skúli.**

Mentamálanevndin hevur á fundi tann 10. oktober 2016 viðgjørt uppskot, sum inn er komið frá MAP arkitektum til bygging av nýggjum barnaskúla í Fuglafirði. Nevndin metir uppskotið frá MAP arkitektum ver sera væl úr hondum greitt.

Tað er ein samd mentamálanevnd, sum tekur undir við skitsuuppskotinum og tilmælinum frá bygginevndini og sostatt ein samd mentamálanevnd, sum mælir til at leggja tilmæli fyri fíggjarnevndina og síðan fyri býráðið.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 11. oktober 2016 bæði við atliti til tilmæli frá fíggjarnevndini og uppskot til møguliga fígging av verkætlanini, sum sambært fyriliggjandi kostar kr. 96,0 mió íroknað okkara part av meirvirðisgjaldinum 6,25%.

Nevndin hevur í hesum sambandi móttikið uppskot frá fyrisitingini, dagfest 11. oktober 2016 um fígging av verkætlanini, hetta við atliti til frágreiðing frá MAP arkitektum bæði til kostnað og tíðarætlan fyri bygginingina vm.

Talan er um eitt byggitíðarskeið frá 2016 til 2020, har staðfest er, kr. 2,0 mió eru avsettar í fíggjarætlan kommununar fyri 2016, meðan uppskotið frá fyrisitingini vísir, at byggingin í 2017 hevur tørv á fígging á kr. 21,0 mió, 2018 á kr. 32,0 mió, 2019 á kr. 32,0 mió og 2020 á kr. 9,0 mió samantals kr. 96,0 mó.

Fyrisitingin vísir á staðfestingar av góðkendari fíggjarætlan av rakstri og íløgum í 2016, meðan metingar eru gjørdar av uppskoti til rakstur kommununar 2017-2020, og har framgongur, hvussu stórar upphæddir mettar verða kunnu verða nýttir til íløgur hvørt av hesum fíggjarárum.

Mett verður, at av einum byggikostnaði á kr. 96,0 mió kunnu 45,8 mió verða fíggjarðar av rakstri, meðan neyðugt er at fáa tilvega lán í byggitíðini á kr. 50,4 mió brutto og netto, tá ið avdráttirnir eru drignir frá kr. 40,6 mió.

Hetta bert so við sær, at upphæddirnar til allar aðrar íløgur av rakstri verða kr. 6,7 mió í 2017, kr. 5,5 í 2018, kr. 6,5 mió í 2019 og kr. 11,0 mió í 2020.

Um vit taka útgangsstøði í lánskuldini netto pr. 31. desember 2015 og rokna við, at henda verður 0,60 pr. 31. desember 2016, so verður rúm fyri millum 15-20 mió í lántøku, áðrenn komið verður upp móti eini álíkning við skattaprosenti á 23,0%.

Ein uppgerð frá fíggjardeildini pr. 31. august 2016 vísti, at pláss varð fyri 8 mió í lántøku, men havadi í huga, at partafelagsskatturin nú er endaliga álíknaðum og er sambært uppgerð er kr. 15,3 mió, so alt annað líka eru vit nøkunlunda á sama støði fíggjarliga sum 31. desember 2015.

Ein meiriluti í fíggjarnevndini Sonni á Horni og Eyðun á Lakjuni mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá mentamálanevndini um at taka undir við skitsuprojektinum frá MAP arkitaktum og tilmælinum frá bygginevndini um bygging av nýggjum barnaskúla.

Somuleiðis verður mælt til at taka undir við uppskotinum frá fyrisitingini til fígging, tó soleiðis at uppskotið verður tillagað góðkendu fíggjarætlanum fyri árini 2017-2020, har broytingar kunnu verða framdar bæði viðvíkjandi rakstrarinntøkum og rakstrarútreiðslum.

Sambært MAP arkitektum kunnu upp til kr. 5,0 mió verða fluttar millum fíggjarárini 2017-2020.

Ein minniluti Magnus S. Midjord tekur ikki undir við, at farið verður undir eina so stóra verkætlan júst nú. Hákonjunkturur er, og tíðirnar fíggjarliga eru, sum er, avbera góðar, og nógv virksemi er yvir alt landið, somuleiðis sum hann vísir til, at um verri tíðir koma og búskapurin versnar, so koma vit út í trupulleikar.

Hann vísir eisini á, at Fíggjarmálaráðið mælir staðiliga til, at bæði land, kommunur og kommunalir felagsskapir halda aftur í sínum íløgum, og hesum sjónarmiðum er hann samdur við ráðið í.

Hann metir ikki, nú vit hava hákonjunktur, at vit fáa nóg mikið fyri skattgjaldarans pening við byggjan av barnaskúla júst nú, og hann er heldur ikki samdur við uppskotinum frá MAP arkitektum um útjóndina av nýggja barnaskúlanum.

Hann viðmerkir, at býráðið ikki eigur at viðgera málið um byggjan av barnaskúla og taka endaliga avgerð so tætt upp undir kommunuvalið.

**Avgerð:**
Magnus S. Midjord boðaði frá á fundinum, at hann tók sítt minnilutauppskot í fíggjarnevndini aftur. Tilmælini frá mentamálanevndini og meirilutanum í fíggjarnevndini vórðu samtykt, við tí broyting, at tannlæknastovan verður tikin í í 1. byggistigi og staðsett á skúlans øki. (9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18.00.

Magnus S. Midjord

Sigga Óladóttir Joensen

Dánjal Vang

Eyðun á Lakjuni

Pætur Ábrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Árant Berjastein

Jann N. Toftegaard

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen